# Eingin orsøk at hækka kommunuskattin

**Andstøðan í býráðnum í Havn tekur ikki undir við at hækka kommunuskattin. Tá ið fíggjarætlanin fyri 2006 var fyri í býráðnum hóskvøldið, hevði andstøðan eitt alternativt fíggjarlógaruppskot, har eingin hækking var í kommunuskattinum.**

**BÝRÁÐSPOLITIKKUR**
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað var tó fíggjarætlanaruppskotið hjá samgonguni, ið bleiv samtykt í býráðnum, og tað merkir, at borgararnir í Havn komandi ár skulu gjalda eitt prosent meira í kommunuskatti. Men stóð tað til andstøðuna, hevði kommunuskattaprosentið framhaldandi verið 18,75 og ikki 19.75, sum tað nú verður frá nýggjárinum.



*Sjúrður Olsen, býráðslimur í Havn, og hinir limirnir í andstøðuni í Tórshavnar Býráð høvdu eitt alternativt fíggjarlógaruppskot, har tað ikki var neyðugt at hækka kommunuskattaprosentið.*

*savnsmynd*

**Kommunan ráð at lata verða**

Sjúrður Olsen, býráðslimur hjá Fólkaflokkinum, sigur, at tað er als eingin orsøk til at hækka kommunuskattin.

- Vit fáa umleið 22 milliónir aftur úr kreppulánsgrunninum, og harafturat høvdu vit kunnað tikið 1,7 millión av samlaðu íløgujáttanini, sum er upp á 98 milliónir, sum vit undir øllum umstøðum ikki klára at brúka. Hetta hevði svarað til tað, ið vit annars fáa umvegis tað eyka prosentið, ið verður lagt omaná kommunuskattin. Tað hevur Tórshavnar Kommuna eisini ráð til, tí hon eigur nógvar pengar. Tað ger heldur einki, um kommunan er við til at geva borgarunum ein skáa, sigur Sjúrður Olsen.

Býráðslimurin vísir á, at tær umleið 22 milliónirnar, sum eru goldnar í kreppulánsgrunnin, er peningur, sum skattaborgarin sjálvur hevur goldið, og tí er tað einki meiri enn náttúrligt, at tað eisini kemur teimum til góðar.

- Tá ið vit viðgjørdu hetta í býráðnum hóskvøldið, brúktu bæði borgarstjórin og Leivur Hansen, býráðslimur tað sum undanførslu, at vit noyddust at hækka skattaprosent eisini fyri at verða solidarisk við hinar kommunurnar, sum ikki hava ráð til at lata verða. Tað halda vit verða fullkomiliga burturvið, sigur Sjúrður Olsen.




BYGNINGSVERKFRØÐINGUR & BYGGIFRØÐINGUR

HMP Consult søkir eftir bygningsverkfrøðingi og byggifrøðingi at byrja beinanvegin.

Arbeiðsøkini, ið størvini umfata, eru bygningar og anleggsarbeiði.

Løn og starvstreytir sambært avtalu.

Áhugað kunnu ringja ella senda teldupost til HMP Consult, Hans Haraldsen, hans@hmp.fo, fyri at fáa meira at vita um starvið.

Umsókn saman við prógvum og viðmælum skal sendast til adressuna niðanfyri, merkt "Bygningsverkfrøðingur" ella "Byggifrøðingur", og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 9.

SISERO 351800

HMP CONSULT Sp/f
Óluvugøta 12
FO-100 Tórshavn
Telefon 312279
Telefax 318346
Teldupostur hmp@hmp.fo

hmp CONSULT
VERKFRØÐIRÁÐGEVING



BÓKIN UM LOSJURNAR




Lýsir gerandisdag føroyingsins meira enn 100 ár aftur í árini.
Tíðarmyndir og hendingar, ið ávirkaðu okkara uppvøkstur.
Siðsøguligu lýsingarnar eru verdar at eiga.
Tú kennir teg aftur í mynd sum teksti.
Allar losjubygdir eru lýstar.
**Tú gerst vísari við losjubókini undir koddanum**

**KR. 325,-**

Forlagið Mál & Mentan
Postboks 222 · FO-110 Tórshavn· Tel 283808



**Roknskaparfólk**

TEAM85

Vit leita eftir einum skilafólki til at røkja og skipa roknskaparviðurskifti okkara. Starvið er fulltíðarstarv og verður lønt eftir avtalu.

Bókhaldarin hevur beinleiðis tilvísing til stjóran og hevur ábyrgdina av at dagliga arbeiðið viðvíkjandi bókhaldi og roknskapi verður dagført. Uppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna eisini um viðlíkahald og menning av mannagongdum í Auto Service Pf..

Vit ímynda okkum, at tú hevur royndir, ert fyrikomandi og tekur arbeiðið í álvara.

At vera roknskaparfólk hjá okkum er líka so mennandi og spennandi, sum tú gert tað til. Harvið meina vit, at tað hevur alstóran týdning, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og kanst hava tamarhald á fleiri uppgávum samstundis.

Tú fært rættiligar fríar hendur at laga arbeiðsdagin og mest sannlíkt verður tú ein teirra, ið best veit, hvussu vit hava tað.

Hevur tú spurningar til starvið, ert tú vælkomin at ringja til Árna Rasmussen á tlf. 345 400. Umsóknir, ið skulu verða okkum í hendi innan 1. desember, skulu sendast til:

**Auto Service P/F**
**Árni Rasmussen**
**undir Krákugjógv**
**100 Tórshavn**

Auto Service telist millum størstu bilasølur í landinum og umboðar bilamerkini Peugeot, Nissan, Saab og Opel

OPEL PEUGEOT NISSAN SAAB



undir Krákugjógv tel. 345400 **Auto Service**